

*Tróndur Patursson, listarmaður, og Heðin Mortensen, sum fekk heiðurin at tendra nýggja listarverkið í SMS*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Heðin tendraði listarverk

**30 ÁRA DAGUR**

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Í gjár var stórt hátíðarhald í SMS í sambandi við, at 30 ár eru liðin síðani handilsmiðstøðin lat dyrnar upp á fyrsta sinni.

Rás 2 sendi allan dagin úr SMS, har práta var við nógv fólk um bæði nýtt og gamal.

Tað er Hans Mortensen, sum øll árini hevur verið ímyndin av SMS, men nú hevur hann lagt stjórastarvið frá sær og hevur selt sín part til sonin, Niels Mortensen, sum hevur verið medstjóri í SMS í nøkur ár. Hann er nú stjóri í P/F SMS.

Í blaðnum í gjár vísti Niels Mortensen m. a., hvussu nógv virksemið hjá SMS er vaksið - eisini uttan fyri sjálva handilsmiðstøðina við eitt nú Bónus og Mylnuni. Hann gjørdi greitt, at vit enn ikki hava sæð tað síðsta, sum felagið ætlar sær undir.

Í sambandi við hátíðarhaldið var eitt stórt glaslistarverk hjá Tróndi Patursson avdúkað - ella tendrað, og henda heiður fekk Heðin Mortensen, borgarstjóri, í gjár kl 17, eftir at Meyla og hennara harkalið hevði undirhildið børnum í einum tíma á torginum í SMS.



*James Olsen, Eyðfinn Drewsen og Heri Simonsen vóru vertir á Rás 2,s um sendir úr SMS í allan gjár. Her práta teir við býlingastjóran í SMS, Kitty-Mey Ellefsen*

*Mynd: Álvur Haraldsen*